# Gerhard sigrar í Sandoynni

**Sambært nýggju spurnarkanningini, sum Fynd hevur gjørt fyri Sosialin, kundi hugsast, at um val var í dag, høvdu stórar broytingar hent í summum av gomlu valdømunum, samanborið við seinasta val**

POLITIKKUR
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Í Sandoynni sýnast tað, at veljararnir hava mist álitið á Tjóðveldinum. Við tað, at flokkurin er farin frá at hava nærum ein triðing av atkvøðunum, til av vera farnir niður í umleið helvtina av tí. Tað vil siga ein sættapart. Hinvegin er Javnaðarflokkurin vaksin úr umleið einum fimtaparti heilt upp í eina lítla helvt.

Burturúr hesum hava vit eina greiða ábending um, at Gerhard Lognberg er yndispoltikari sandoyinga. Harafturat gevur kanningin eisini ábendingar um, at Páll á Reynatúgvu, við at akta flokk sín í tunnilsmálinum, veruliga hevur mist ein stóran part av sínum veljarum á Sandoynni.

Eisini ábendingar um, at tað er størri álit á Fólkaflokkinum á Sandoynni, enn seinast val var, tí Fólkaflokkurin er farin úr einum sættaparti, heilt upp í ein stóran fimting. At enda kann nevnast um gamla Sandoyarvaldømi, at av teimum spurdu, var ein heilur fimtapartur, ið ikki vita hvat tey høvdu valt, um val var í dag.

### Suðuroy

Í Suðuroynni, sum vanliga er háborg Javnaðarfloksins, er líkt til, at fólkið hevur mist nógv fyri flokkinum. Kanningin vísir, at flokkurin er farin frá at hava ein triðingi av atkvøðunum, til at bert hava ein fimtapart. Harafturat er Fólkaflokkurin vaksin eitt vet, meðan Tjóðveldi er minkað sindur. Afturat hesum er støðan í Suðuroynni ikki broytt nakað serligt síðani seinasta val.

### Lítið broytt

Kring restina av landinum, eru sambært spurnarkanningini, bert lítlar broytingar hendar í hugsanini hjá fólki síðani valið í vetur. Tó síggja vit, at javnaðarflokkurin gongur aftur í øllum teimum gomlu valdømunum, við upp ímóti umleið tíggju prosentum, sum var munurin í Norðoyggjunum. Men havast má í huga, at í kanningini var ein tíggjundapartur, sum enn ikki veit hvat tey høvdu valt.

Úrslitið má takast við fyrivarni, tí grundarlagið er í summum førum lítið.

**Hvønn flokk høvdu tygum atkvøtt fyri um val var í dag?**
**Hvønn politikara høvdu tygum helst sæð sum løgmann?**

Loddrett prosentuering

| | Fólk | Samb | Javn | Sjálv | Tjóðv | Miðfl | Sum |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Jørgin Niclassen | 22.4 | 0.6 | 0.8 | 0.0 | 0.5 | 0.0 | 5.4 |
| Kaj Leo Johannesen | 0.0 | 15.6 | 0.0 | 2.1 | 0.0 | 0.0 | 3.9 |
| Jóannes Eidesgaard | 9.7 | 20.7 | 71.9 | 25.5 | 15.8 | 15.8 | 25.3 |
| Kári P. Højgaard | 0.0 | 0.6 | 0.8 | 14.9 | 0.0 | 0.0 | 1.2 |
| Høgni Hoydal | 0.0 | 0.0 | 0.0 | 6.4 | 51.5 | 7.9 | 14.3 |
| Jenis av Rana | 0.0 | 0.0 | 0.0 | 0.0 | 0.0 | 10.5 | 0.5 |
| Annfinn Kalsberg | 33.3 | 3.9 | 0.8 | 0.0 | 1.0 | 5.3 | 9.0 |
| Jacob Vestergaard | 2.4 | 0.0 | 0.0 | 0.0 | 0.5 | 0.0 | 0.7 |
| Helena Dam á Neystabø | 0.0 | 0.0 | 0.8 | 0.0 | 0.0 | 0.0 | 0.1 |
| Kári á Rógvi | 0.6 | 0.6 | 0.0 | 17.0 | 0.5 | 0.0 | 1.5 |
| annar | 5.5 | 17.9 | 3.3 | 4.3 | 5.6 | 7.9 | 8.2 |
| Veit ikki | 26.1 | 40.2 | 21.5 | 29.8 | 24.5 | 52.6 | 29.9 |
| Sum | 100.0 | 100.0 | 100.0 | 100.0 | 100.0 | 100.0 | 100.0 |
| N= | 165 | 179 | 121 | 47 | 196 | 38 | 746 |

*Inkludert 746 enheter av i alt 760*
*Utvalg: v3*

Føroya fólk:

# Lurtið eftir fiskifrøðingunum

SPURNARKANNIN
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Spildurnýggj spurnarkanning vísir, at fólkið ynskir, at politikararnir lurta eftir fiskifrøðingunum heldur enn umboðum frá flotanum.

Stóð tað til Føroya fólk, skuldu politikararnir lurta eftir fiskifrøðingunum. Hetta vísir ein spildurnýggj spurnarkanning, sum Fynd hevur gjørt fyri Sosialin. 900 føroyingar vórðu spurdir, hvussu ogn Føroya fólks skal umsitast, og vísti úrslitið, at meiri enn helmingurin av teimum spurdu – 53 % - halda, at løgtingið heldur skal lurta eftir tilráðingunum frá fiskifrøðingunum, enn eftir umboðum frá fiskiflotanum, tá ið dagatalið verður ásett. Ein triðingur – 33 % - vóru ósamd í hesum.

**Gamla valdømið**
**Hvønn flokk høvdu tygum atkvøtt fyri um val var í dag?**

Loddrett prosentuering

| | Suðuroy | Sandoy | Suðurst | Norðurst | Vágar | Eysturoy | Norðo | Sum |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fólkaflokkin | 20.6 | 27.3 | 15.9 | 12.8 | 29.7 | 12.0 | 25.0 | 18.2 |
| Sambandsflokkin | 27.8 | 3.0 | 16.2 | 25.6 | 25.7 | 30.4 | 13.3 | 21.1 |
| Javnaðarflokkin | 22.7 | 21.2 | 14.6 | 12.8 | 8.1 | 8.9 | 11.7 | 13.4 |
| Sjálvstýrisflokkin | 1.0 | 0.0 | 6.5 | 3.8 | 5.4 | 6.8 | 4.7 | 5.2 |
| Tjóðveldi | 16.5 | 15.2 | 26.9 | 23.1 | 20.3 | 21.5 | 14.1 | 21.6 |
| Miðflokkin | 0.0 | 3.0 | 3.6 | 5.1 | 1.4 | 5.8 | 7.8 | 4.2 |
| Miðnámsflokkin | 0.0 | 0.0 | 0.0 | 0.0 | 1.4 | 0.0 | 0.8 | 0.2 |
| Blankt | 0.0 | 0.0 | 2.3 | 1.3 | 0.0 | 0.5 | 2.3 | 1.3 |
| Ikki á val | 2.1 | 6.1 | 1.0 | 5.1 | 1.4 | 2.6 | 3.9 | 2.4 |
| Veit ikki | 9.3 | 24.2 | 12.7 | 10.3 | 6.8 | 11.5 | 16.4 | 12.3 |
| Ógreitt | 0.0 | 0.0 | 0.3 | 0.0 | 0.0 | 0.0 | 0.0 | 0.1 |
| Sum | 100.0 | 100.0 | 100.0 | 100.0 | 100.0 | 100.0 | 100.0 | 100.0 |
| N= | 97 | 33 | 308 | 78 | 74 | 191 | 128 | 909 |

*Inkludert 909 enheter av i alt 909*

**Gamla valdømið**
**Hvønn flokk valdu tygum seinast løgtingsval var?**

Loddrett prosentuering

| | Suðuroy | Sandoy | Suðurst | Norðurs | Vágar | Eysturoy | Norðoyg | Sum |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fólkaflokkin | 14.4 | 15.2 | 17.5 | 14.1 | 28.4 | 11.0 | 26.6 | 17.6 |
| Sambandsflokkin | 26.8 | 3.0 | 15.3 | 25.6 | 28.4 | 27.2 | 14.1 | 20.4 |
| Javnaðarflokkin | 33.0 | 45.5 | 20.1 | 21.8 | 10.8 | 14.1 | 21.1 | 20.7 |
| Sjálvstýrisflokkin | 1.0 | 3.0 | 6.8 | 5.1 | 5.4 | 8.4 | 5.5 | 5.9 |
| Tjóðveldisflokkin | 20.6 | 30.3 | 28.6 | 26.9 | 17.6 | 25.7 | 18.0 | 24.6 |
| Miðflokkin | 0.0 | 3.0 | 3.9 | 6.4 | 2.7 | 8.9 | 10.2 | 5.5 |
| Blankt | 0.0 | 0.0 | 0.6 | 0.0 | 0.0 | 0.0 | 0.0 | 0.2 |
| Ikki valrætt | 1.0 | 0.0 | 1.3 | 0.0 | 1.4 | 0.5 | 0.8 | 0.9 |
| Ikki á vali | 3.1 | 0.0 | 3.9 | 0.0 | 4.1 | 3.7 | 2.3 | 3.1 |
| Veit ikki | 0.0 | 0.0 | 1.3 | 0.0 | 0.0 | 0.5 | 1.6 | 0.8 |
| Ógreitt | 0.0 | 0.0 | 0.3 | 0.0 | 0.0 | 0.0 | 0.0 | 0.1 |
| Sum | 100.0 | 100.0 | 100.0 | 100.0 | 100.0 | 100.0 | 100.0 | 100.0 |
| N= | 97 | 33 | 308 | 78 | 74 | 191 | 128 | 909 |

*Inkludert 909 enheter av i alt 909*

**Hvønn flokk høvdu tygum atkvøtt fyri um val var í dag?**
**Hvat eigur løgmaður at gera í verandi politisku støðu?**

**Loddrett prosentuering**

| | Fól. | Sam. | Jav. | Sjá. | Tjó. | Mið. | Mið. | Bla. | Ikk. | Vei. | Ógr. | Sum |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Skriva út nýval | 24.2 | 21.9 | 13.1 | 23.4 | 10.2 | 18.4 | 50.0 | 33.3 | 22.7 | 13.4 | 0.0 | 17.7 |
| Leggja frá sær | 32.7 | 24.0 | 4.1 | 17.0 | 14.8 | 13.2 | 0.0 | 25.0 | 27.3 | 24.1 | 0.0 | 20.1 |
| Halda fram við restini av samgonguni saman v D | 13.3 | 15.6 | 55.7 | 42.6 | 57.7 | 50.0 | 50.0 | 8.3 | 13.6 | 28.6 | 0.0 | 34.0 |
| Royna at skipa aðra samgongu | 24.8 | 32.8 | 21.3 | 12.8 | 11.7 | 13.2 | 0.0 | 33.3 | 18.2 | 23.2 | 100.0 | 21.9 |
| Veit ikki / leggi ikki í at svara | 4.8 | 5.7 | 5.7 | 4.3 | 5.6 | 5.3 | 0.0 | 0.0 | 18.2 | 10.7 | 0.0 | 6.3 |
| Sum | 100.0 | 100.0 | 100.0 | 100.0 | 100.0 | 100.0 | 100.0 | 100.0 | 100.0 | 100.0 | 100.0 | 100.0 |
| N= | 165 | 192 | 122 | 47 | 196 | 38 | 2 | 12 | 22 | 112 | 1 | 909 |

*Inkludert 909 enheter av i alt 909*